# Fáir og smáir – men feitir fiskar

**Einans 163 toskar í 29 hálum. Hetta vóru døpru úrslitini frá yvirlitistrolingini, sum havrannsóknarskipið, Magnus Heinason, hevur gjørt á Føroyabanka**

FISKASTOVNAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eftir at hava trolað á 29 ymisku støðum á Føroyabanka, gjørdist samlaða veiðan av toski einans 163 fiskar - ella sløk 1200 pund av toski.

Hetta er ein minking uppá 54% samanborið við toskaveiðina á heystyvirlitistrolingini í fjør, og einans 6% av veiðuni í 1997, tá Magnus Heinason fekk 18.420 pund av toski.

Eisini hýsan er í minking á Bankanum.

Í alt vórðu fingin 5.772 pund av hýsu. Hetta er ein minking upp á 56% samanborið við árið fyri og einans 20% av hýsuveiðini í 2003.

Hjá upsanum var minkingin í ár 14% samanborið við í fjør.

### Fiskurin ikki rak

Hóast høvuðsfiskasløgini eru í stórari minking á Føroyabanka, er tó einki sum bendir á, at fiskinum vantar føði, tí hann er ikki rak.

Tá ið fiskifrøðingar gera upp, hvussu feitur fiskurin er, nýta teir hugtakið "konditiónsfaktor".

– Hetta er lutfallið millum vekt og longd á fiskinum. Hægri talið er, feitari er fiskurin. Hesi tølini peika tó uppeftir samanborið við úrslitini frá í fjør.

Eyðfinn Magnussen, biologur, sigur, at kanningarnar hesaferð vístu, at toskurin er 1% feitari nú enn fyri einum ári síðani.

– Hjá hýsuni er økingin 10%, meðan upsin er vorðin 5% feitari samanborið við kanningarnar á heysti 2005, sigur hann.

### Fiskurin í minking

Biologurin sigur, at tað er ikki einans toski, hýsu og upsa, sum minni er til av.

– Minkingin er galdandi fyri flestu fiskasløgini. Av teimum 30 sløgunum, sum vórðu fingin á túrinum, var minni til av 19 teirra, meðan veiðan einans var størri fyri 6 av fiskasløgum. Hetta eru tó fiskasløg, sum ikki hava týdning fyri føroyska fiskiflotan.

Eyðfinn Magnussen sigur, at 12 fiskasløg vórðu fingin í yvirlitstrolingini á heysti 2005, sum als ikki vórðu fingin í yvirlitstrolingunum hesaferð.

### Fá skip á bankanum

At lítið er til av fiski á Føroyabanka, sæst eisini aftur á fiskiflotanum, tí so at siga eingi skip vóru at síggja á Bankanum, nú yvirlitstrolingar vórðu gjørdar í heyst.

Fyri nøkrum árum síðani hevði Magnus Heinason ofta ilt við at taka allar trolstøðirnar, sum skuldu takast undir yvirlitstrolingini á Føroyabanka, tí ikki var atkomandi fyri teimum nógvu línubátunum, sum lógu og royndu eftir toski á tí grunna partinum av Bankanum.

– Men soleiðis var ikki hendan túrin. Tá vit komu út, vóru einast tveir línubátar at síggja. Hesir lógu í kantinum og royndu eftir skøtu og longu, sigur Eyðfinn Magnussen, biologur.



*Yvirlitstrolingarnar hjá Magnusi Heinason í heyst vístu, at lítið er til av fiski á Føroyabanka, men fiskurin er væl fyri*
*Mynd: Rógvi Mouritsen*



*Hýsan á Føroyabanka er eisini í stórari minking. Yvirlitstrolingarnar í heyst góvu heili 56% minni enn í fjørheyst*

# Torført at siga hvør orsøkin er

**– Antin hevur tilgongdin av fiski verið lítil, ella hevur royndin verið ov stór. Talan kann eisini vera um bæði um somu tíð, sigur Eyðfinn Magnussen, biologur, sum hevur verið við til at gjørt yvirlitstrolingar á Føroyabanka í fleiri ár**

FISKASTOVNAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Yvirlitstrolingarnar, sum Magnus Heinason hevur gjørt á Føroyabanka í heyst, vísa týðiliga, at lítil fiskur er á Bankanum. Fiskurin er sum heild lítil í tali, og toskurin er væl smærri, enn hann plagdi at vera.

Eyðfinn Magnussen, biologur, sum starvast á Náttúruvísindadeildini hjá Fróðskaparsetri Føroya, sigur, at á 29 trolstøðum fingu teir bert einar 10-15 toskar í hvørjum háli.

– Hesi tóvini vardu í umleið ein tíma hvørt, so hetta er rættiliga lítil veiða, ásannar biologurin.

Hann vísir á, at tað, sum fæst á Føroyabanka í dag, er fiskur, sum er eini 2-3 ára gamal, og tí er fiskiskapurin í dag tengdur at tí, sum kom undan hesi árini.

Spurdur, um hann dugir at siga, hví so lítil fiskur er á Føroyabanka í dag, nú tað annars vísir seg, at fiskurin sum heild er í góðum holdum, sigur biologurin:

– Tað er sjálvandi torført at siga, men fiskifrøðingar hava leingið ávarað um, at veiðan á Bankanum hevur verið ov stór seinastu árini.

Hann vísir á, at tað, sum er at fáa á Føroyabanka í dag, er eitt úrslit av tí, sum kom undan fyri 2-3 árum síðan – og teirri roynd, sum hevur verið síðan. Aftrat hesum spæla so náttúruviðurskiftini sjálvsagt eisini inn.

Biologurin vísir á, at fiskurin saktans kann vera í góðum holdum, hóast veiðan er lítil.

– Er lítil fiskur, er meira av føði í part til hvønn fiskin, sigur hann.

Eyðfinn Magnussen sigur, at fyri nøkrum árum síðan var toskurin á Bankanum í miðal einar 90 cm. til longdar, og vektin fyri hvønn fiskin lá um 10 kilo.

– Toskurin, sum vit fingu undir yvirlitstrolingunum hesaferð, lá millum 50 og 60 cm. til longdar, sigur biologurin.

Í fyrru helvt av nítiárunum var Føroyabanki friðaður fyri allari veiði, men síðan hevur Bankin verið opin aftur fyri húkaveiði.

Nú bendir so alt á, at støðan toskinum á Bankanum er verri, enn hon hevur verið í fleiri ár.



*Eyðfinn Magnussen sigur, at fiskurin á Føroyabanka saktans kann vera í góðum holdum, hóast veiðan er lítil. - Er lítil fiskur, er meira av føði í part til hvønn fiskin, sigur hann*